

# Eitt ár aftrat við egin-kvotu

Skiparin á Norðborg sigur seg ivast í, um eitt ár ikki er ov lítið til tess at prógva okkara sjálvsøgdu rættindi til eitt betri makrelbýti.

Jón Rasmussen, sum í skifti við beiggja sín, Boga Rasmussen, er skipari á verksmiðjuskipinum Norðborg, heldur, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, eigur at hugsa seg væl um, áðrenn hann skrivar undir nýggja strandalandaavtalu um makrelin.

– Saman við nóta-vinnuni annars eru vit sjálvsagt fyri, at Føroyar framhaldandi eru partur av hesi avtalu. Men nú vit hava prógvað, at nógvur makrelur er og kann veiðast í føroyskum sjógvi, eigur hetta sjálvsagt at telja við í okkara býtisparti, tá nýggj avtala skal gerast millu londini um makrelin.

Jón Rasmussen ásannar, at økta makrel-kvotan er komin sera væl við hjá nótaflotanum og føroyskari fiskivinnu í síni heild í ár.

– Vit hava gjørt eitt sera gott ár higartil, og fæst eingin nýggj avtala, sum gevur Føroyum ein frægari prosentpart av heildarkvotuni, haldi eg, at landsstýrismaðurin eigur at hugsa seg væl um, áðrenn hann gongur undir eina nýggja avtalu um makrelin.

Skiparin á Norðborg sigur seg eisini ivast í, um eitt ár ikki er ov lítið til tess at prógva okkara sjálvsøgdu rættindi til eitt betri býti.

– Men møta vit størri forstáilsi í eitt nú Noregi og ES í samráðingunum hesaferð, enn vit hava gjørt, og okkara býtispartur kvinkar uppeftir við nøkrum prosentum, er støðan ein onnur, sigur Jón Rasmussen, skipari á Norðborg.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Skálkaskjól?




Gamla loysingaruppskotið hjá sjálvstýrislandsstýrinum er aftur á tingi eftir nógvar navnabroytingar

## Í MORGIN

*5/8 °C*



1-6 m/s 1-6 m/s

Fleyr til gul av ymsum ættum, og yvirhøvur turr og sólglottar. Hiitin millum 5 og 8 stig.

## SUNNUDAGIN

*11/14 °C*



5-10 m/s 2-7 m/s

Fleyr til gul av suðri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MÁNADAGIN

*12/15 °C*



4-9 m/s 4-9 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turr og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitn millum 12 og 15 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningiog yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. vestan fyri Føroyar fer suðureftir.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum viknar nakað, men ein háðtrýstryggur til havið norðan fyri Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG

*fyri september*




## AVFALL

*fyri september*




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept Mánin longst frá jørðini
23. sept Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sept | 06:40 | 18:58 | 05:40 | 17:58 | 05:55 | 18:13 | 08:40 | 20:58 | 09:40 | 21:58 | 04:55 | 17:13 | 03:55 | 16:13 | 06:55 | 19:13 | 07:55 | 20:13 | 06:25 | 18:43 | 07:40 | 19:58 |
| 23. sept | 07:16 | 19:33 | 06:16 | 18:33 | 06:31 | 18:48 | 09:16 | 21:33 | 10:16 | 22:33 | 05:31 | 17:48 | 04:31 | 16:48 | 07:31 | 19:48 | 08:31 | 20:48 | 07:01 | 19:18 | 08:16 | 20:33 |
| 24. sept | 07:51 | 20:09 | 06:51 | 19:09 | 07:06 | 19:24 | 09:51 | 22:09 | 10:51 | 23:09 | 06:06 | 18:24 | 05:06 | 17:24 | 08:06 | 20:24 | 09:06 | 21:24 | 07:36 | 19:54 | 08:51 | 21:09 |
| 25. sept | 08:28 | 20:47 | 07:28 | 19:47 | 07:43 | 20:02 | 10:28 | 22:47 | 11:28 | 23:47 | 06:43 | 19:02 | 05:43 | 18:02 | 08:43 | 21:02 | 09:43 | 22:02 | 08:13 | 20:32 | 09:28 | 21:47 |
| 26. sept | 09:07 | 21:27 | 08:07 | 20:27 | 08:22 | 20:42 | 11:07 | 23:27 | - | 12:07 | 07:22 | 19:42 | 06:22 | 18:42 | 09:22 | 21:42 | 10:22 | 22:42 | 08:52 | 21:12 | 10:07 | 22:27 |